FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 15. februar 2021
J. nr.: 21/00052-2

Svar uppá fyrispurning nr. 52-079/2020 frá Jaspuri Langgaard, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um ferðsluna í Eysturoyartunlinum,

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv akfør hava koyrt gjøgnum Eysturoyartunnilin, síðan hesin lat upp fyri almennari ferðslu 19. desember 2020?
2. Hvussu ljóða tey allar nýggjastu ferðslutølini, t.e. dagliga, vikuliga og mánaðarliga?
3. Hvussu nógv akfør metir Landsverk koyra longra teinin, umvegis Norðskálatunnilin?
4. Hvussu nógv metir Landsverk, at samfelagsvirðið er minni enn tað kundi verið, við tað at nógv koyra longra teinin?

Svar:

Til nr. 1 og nr. 2
Í viku 2 koyrdu í miðal 2.741 akfør dagliga á norður-suður leiðini í Eysturoyartunlinum og 410 akfør dagliga í miðal tvørturum Skálafjørðin.

Í viku 3 koyrdu í miðal 3.108 akfør dagliga á norður-suður leiðini í Eysturoyartunlinum og 539 akfør dagliga í miðal tvørturum Skálafjørðin.

Í viku 4 koyrdu í miðal 3.223 akfør dagliga á norður-suður leiðini í Eysturoyartunlinum og 541 akfør dagliga í miðal tvørturum Skálafjørðin.

Frá 19. desember til 7. januar í ár, t.e. meðan Eysturoyartunnilin var ókeypis, var ferðslan í tunlinum omanfyri 7.500 akfør í miðal um samdøgrið tilsamans, t.e. bæði á norður-suður leiðini og tvørturum Skálafjørðin.

Til ber ikki at útgreina ferðslutølini nærri, t.e. býtt á einstakar dagar ella vikur. Tunnilsfelagið ætlar at almannakunngera ferðslutøl mánaðarliga, eins og gjørt verður í sambandi við Vága- og Norðoyatunnilin. Ferðslutølini eru ikki tøk dagliga ella vikuliga, men verða gjørd tøk mánaðarliga eins og fyri Vága- og Norðoyatunnilin.

Tá ið umræður ferðslutølini, sum fyriliggja í sambandi við Eysturoyartunnilin, er neyðugt at gera vart við, at tunnilin varð tikin í brúk á hávetri. Ferðslan minkar sum heild á føroysku vegunum í jólafrítíðini og í januar. Til dømis er minst ferðsla í Vága- og Norðoyatunlinum í januar og desember mánaða av øllum mánaðunum í árinum. Minni virksemi og færri tiltøk eru eisini um veturin sammett við um summarið, umframt at færri tiltøk eru í løtuni orsakað av koronafarsóttini.

Til dømis er dagliga miðalferðslan í Vágatunlinum um 20% lægri í januar sammett við dagligu miðalferðsluna fyri alt árið. Í Norðoyatunlinum er dagliga miðalferðslan um 15% lægri í januar sammett við miðalferðsluna fyri alt árið. Ferðslumetingarnar, sum vórðu gjørdar í sambandi við Eysturoyartunnilin, vóru sjálvandi metingar av miðalferðsluni fyri alt árið.

Til nr. 3 og nr. 4
Landsverk hevur ferðslutøl í Norðskálatunlinum, sum geva eina ábending um, hvussu nógv akfør framvegis koyra longra teinin umvegis Norðskálatunnilin. Tølini siga kortini bara, hvussu nógvir akfør koyra ígjøgnum Norðskálatunnilin, ikki hvaðani tey koma ella hvagar tey fara.

Neyðugt er at gera vart við, at tað er ov tíðliga at siga nakað við vissu um, hvussu ferðslutølini í Norðskálatunlinum fara at broytast av Eysturoyartunlinum, tí ov stutt tíð enn er fráliðin, síðani Eysturoyartunnilin varð tikin í brúk.

Tølini benda á, at ferðslan í Norðskálatunlinum minkaði munandi, eftir at Eysturoyartunnilin varð tikin í brúk. Tølini benda eisini á, at ferðsla síðani vaks eitt lítið vet aftur í Norðskálatunlinum, eftir at tunnilsgjald varð tikið í Eysturoyartunlinum, t.e. áðrenn og eftir 11. januar í ár.

Verður hædd tikin fyri árstíðini á árinum og verður sammett við ferðsluna í 2019, verður mett, at um 900 akfør koyra longra teinin umvegis Norðskálatunnilin dagliga. Eins og nevnt omanfyri, ber ikki til at siga, um akførini koma av Skálafjørðinum, aðrastaðni úr Eysturoynni, Norðoyggjunum ella úr Tórshavn ella hvagar akførini fara.

Enn ber ikki til at siga, hvussu nógv samfelagsvirðið av Eysturoyartunlinum er minni, enn tað kundi verið, við tað at nøkur akfør koyra longra teinin. Hetta er treytað av nógvum ymiskum viðurskiftum, til dømis neyv ferðslutøl, ferðalongd, ferðaendamál, hvussu nógv koyra saman í akførunum og stødd og slag á akførunum.

Leggjast kann aftrat, at Landsverk arbeiðir við at menna ein kostnyttu- og CO2-myndil og við at menna og útbyggja verandi ferðslumyndil. Hetta arbeiðið verður væntandi liðugt í summar, og tá fer væntandi betur at bera til at lýsa samfelagsnyttuna. Gjørt verður eisini vart við, at enn er ov tíðliga at staðfesta, hvør árliga miðalferðslan verður í Eysturoyartunlinum, við tað at tunnilin enn bara hevur verið opin nakrar vikur á hávetri.

Tinganes, 15. februar 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum